**Viðmerkingar til Eyðgunn Samuelsen:**

# Ongantíð verið í iva um at Dagtilhaldið Sóljan framhaldandi skal vera opið



**ELSEBETH GUNNLEYGS-DÓTTUR HANSEN**

býráðslimur í Klaksvíkar kommunu

Tá ið eg byrjaði í býráðum, var eitt tað fyrsta, sum var á skránni Dagtilhaldið, Sóljan, har løgtingið júst hevði samtykt at taka fíggjarliga grundarlagi undan Dagtilhaldinum í Klaksvík.

Tað var ongantíð nakar ivi í mínari sál, at Dagtilhaldið framhaldandi skuldi vera opið. Men spurningurin var, hvar fíggingin skuldi finnast.

Á fyrsta fundi hjá nývaldu sosialunevnd, vóru vit samd um, at Dagtilhaldið skuldi framhaldandi vera opið. Nevndin bleiv eisini samd um at finna eina loysn hvussu Dagtilhaldið skuldi rekast restina av árinum. Avgjørt bleiv at arbeiðast skuldi við hesum til næsta nevndarfund.

Á øðrum nevndarfundi í sosialunevnd, varð ein loysn funnin.

Sum øllum kunnugt, so er Klaksvíkar Kommuna ikki so væl fyri í løtuni, sum hesu seinastu mongu árini. Her mátti raðfestast.

Sosialanevnd bleiv samd um, at vit fyribils skuldu brúka pening til rakstur av játtanini, sum var avsett til útbygging av Dagtilhaldinum.

Har vóru tveir kostir í at velja, og hvørgin teirra var mjúkur. Antin skuldu vit ikki brúka av játtanini, sum var avsett til útbygging av Dagtilhaldinum og vera noydd til at snara lykilin um -ella brúka pening frá hesi játtan, soleiðis, at Dagtilhaldið framhaldandi kundi verða opið restina av árinum.

Hetta uppskotið bleiv einmælt samtykt á seinasta býráðfundi.

Rætt er tað, at minnilutin Eyðgunn Samuelsen, Hans Arne Bertholdsen og Jákup Mikkelsen, høvdu eitt minniluta uppskot, um at fíggja Dagtilhaldið Sóljuna við at taka av játtanini frá reinsan av Ósánni, men hetta fall.

Mín áskoðan er, at tað hastar at reinsa Ósánna, sum liggur við ein barnaskúla, soleiðis at fyribyrgt verður, at kloakkvatn og onnur óhumska rennur í ánna. Hetta burdi verið gjørt fyri nógvum árum síðani.

**Sosialadeild niðurraðfest?**
Tá ið eg byrjaði í býráðnum, var nógv broytt á sosialudeild beint framman-undan. Sparirunda hevði verið eftir tað fíggjarliga ódnarveðrið í býráðum beint áðrenn býráðsvalið.

Henda sparirunda rakti ikki sosialudeildina, men deildin hevur síðani mist starvsfólk sum fóru í onnur størv.

Sosialanevnd í nýggja býráðnum hevur tikið hetta málið upp - at tað manglar fólk á sosialudeild og er ferð við at finna eina loysn á trupuleikanum. Sjálvt um tað følist buldrut til tíðir, so ivist eg onga løtu í, at her fara vit eisini at finna eina loysn. Eri av tí sannføring, at júst í ringum tíðum er brúk fyri einari vælvirkandi og ikki niðurraðfestari sosialudeild.

Samgongan hevur raðfest, at hava Dagtilhaldið opið, og arbeitt verður við at betra um korini hjá sosialudeild.

Samstundis verður Ósáin eisini reinsað og er tað í tøkum tíma, at hetta verður gjørt. So her er longu komið væl burtur úr.

**Visiónir á eldraøkinum**
Tað sum eg fleiri ferðir havi ført fram í fjølmiðlunum og eisini í mínum arbeiði, sum býráðslimur, er fyribyrgjandi arbeiði á eldraøkinum.

Okkara eldru, skulu hava eitt virðiligt og innihaldsríkt lív. Her havi eg fleiri ferðir pointerað hvussu umráðandi tað er at hava eitt vælvirkandi dagtilhald, tí hetta er við til at fyribyrgja, at okkara eldru fara á ellisheim fyrr enn neyðugt.

Sjálvandi vilja tað so aftur vera nøkur, sum hvørki brúka dagtilhald ella fara á ellisheim.

Til síðst kann eg nevna, at vit hava visiónir um eitt nýtt Ellis- og vistarheim í Klaksvík. Eg havi eisini í fjølmiðlunum spurt um partur av peninginum, sum løgmaður sigur vit eiga í ymsum grunnum, kann brúkast til at byggja ellisheim fyri, so tørvurin á eldraøkinum verður nøktaður.

Jú sanniliga hevur kommunan visiónir um nógv ymiskt, men tað er eingin loyna, at fíggjarstøðan hjá kommununi ikki loyvir øllum hesum í løtuni, men einaferð fer at lýsna, og tá eru vit til reiðar at føra visiónirnar út í lívið.

# Klaksvíkingar aftur í stoytinum

**Eftir at hava tapt móti Tvøroyrar Billardfelag og spælt javnt móti Mimi løgdu klaksvíkingar seg aftur klárt á odda í føroyameistarakappingini í billard, tá oddaliðið hjá Klaksvíkar Billardfelag vann 8-0 á Klaksvíkar Billardfelag 2 við meira enn 30 eygum í meðal**

**BILLARD FM**



Føroyameistarakappingin í billard hevur átt nógvan spenning allar hesar fyrstu dystirnar. Fyrst legði Mimir seg á odda, síðani kom Klaksvíkar Klubbi 1 stormandi, síðani gjørdu tvøramenn eitt rættuligt hál, og nú hava veteranarnir úr Klaksvík aftur lagt seg fremst. Men enn kann kortini nógv broytast, tí øll liðini hava ikki spælt eins nógvar dystir.

Eftir at hava spælt javnt móti Mimi næstseinasta vikuskiftið 4-4 skoraði betra liðið úr Klaksvík fult stigatal 8-0 móti sínum nr. 2 liði. Sigurin var tó ikki bert væleydnaður í stigum. Kristian Sune Høgnesen og Sonhard Johannessen ruddaðu borðið nærum hvørja ferð, tá sluppu framat. Endaliga úrslitið gjørdist, at teir fingu umleið 30 eygu í meðal. Kristian Sune hevði besta spælið uppá 686 eygu og besta umfarið uppá 240 eygu.

Tvøroyrar Billardfelag hevði vitjan av Havnar Klubba og vann 6-2.

Við hesum úrslitinum liggur Klaksvíkar Klubbi 1 nú á odda við 36 stigum fyri seks dystir, 19,9 eygu í meðal, Tvøroyrar Billardfelag er nr. 2 við 24 stigum, 14,3 eygum í meðal fyri fimm dystir, Mimir er nr. 3 við 18 stigum, 17,0 eygum í meðal fyri tríggjar dystir, Havnar Klubbi er nr. 4 við 12 stigum, 12,9 eygum í meðal fyri fýra dystir og aftast er Klaksvíkar Billardfelag 2 við 6 stigum, 9,4 eygum í meðal fyri seks dystir.

Hetta vikuskiftið vitjar Mimir á Tvøroyri og Klaksvíkar Billardfelag 1 í Havnar Klubba.

# Nýggja siglingarkervið hjá Faroe Ship av bakkastokki í morgin

**TÍÐINDASKRIV**
*frá Faroe Ship*

**- Nýggir møguleikar hjá u tflutningsvinnuni - serliga laksa og feskafiska u tflytarum**

Frá mars 2009 økir Faroe Ship komu- og fráferðir til framа fyri Føroyskt vinnulív. Faroe Ship kemur at reka 3 siglingarleiðir millum Føroyar og útheimin við 5 skipum, t.e.:

- Føroyaleiðin (Blikur) siglir beinleiðis úr Føroyum til Danmarkar (Århus) mikudag
- Suðurleiðin (Selfoss/Brúðarfoss) siglir beinleiðis til UK (Immingham) fríggjadag
- Norðurleiðin (Goðafoss/Dettifoss) siglir beinleiðis til Evropa (Rotterdam) leygardag

Innflutningur frá øllum Evropa kemur við Føroyaleiðini og Norðurleiðini til Føroyar í vikuskiftinum.

Fríggjadagin 6. mars 2009 kemur Brúðarfoss til Føroyar og fer síðani beinleiðis til Immingham, leygardagin 7. mars kemur Dettifoss til Føroyar og fer síðani beinleiðis til Rotterdam og mikudagin 11. mars 2009 fer Blikur beinleiðis úr Føroyum til Århus.

Nýggja siglingarkervið er sera vælegnað til útflutning av feskum laksi og feskfiski umframt frystum og saltaðum fiskavørum v.m. Nýggja siglingarætlanin gevur útflutningskundunum nýggjar møguleikar og tryggjar at vøran kemur á allar marknaðir í Evropa týðiliga mánamorgun, umframt at geva møguleika til víðari flutning til t.d. USA, mið- og fjarðeystu, Russland og baltiskulondini.




*Faroe Ship – siglingarkervi – frá mars 2009*